# Stóðu vit saman, Føroya synir sterku...

**Tað var Sjúrður Olsen, býráðslimur í Havn, sum í dag setti ólavsøkuna á Tinghúsvøllinum kl 14. Sjúrður Olsen, sum er ættaður og býr á Argjum, hevur býráðslimur fyri Fólkaflokkin síðani 1. januar 2001**
**Niðanfyri prenta vit røðuna hjá Sjúrði Olsen:**



Góðu føroyingar!

Góðu ólavsøkugestir !

Tað er mær ein gleði og stór æra, at Tórshavnar Ítróttarráð hevur biðið meg um at seta ólavsøkuna í ár. Tað takki eg fyri og vil eg nýta høvi at bjóða øllum at verða hjartaliga vælkomin til Havnar á ólavsøku.

Ólavsøkan, tjóðdagur okkara er til minnis um Kong Ólav, sum lat lív í bardaga móti heidna bóndaherinum á Stiklastøðum ár 1030, bert 35 ára gamal. Tað kann tykjast eitt sindur løgi, at vit soleiðis heiðra ein norskan kong, men havandi í huga, at tá hoyrdi Føroyar undir Trøndheims Bispadømi, og at kirkjan tá hevði almikið vald, er tað kanska ikki so løgi kortini.

Føroyingar byrjaðu ólavsøkuhaldið umleið 100 ár aftan á deyða Ólav hin Heilaga, og hava vit hildið ólavsøku síðani tá.

Nú á døgum man ólavsøkan í Føroyalands miðstøðu, Tórshavn, vera eindømi sum savningardepil í londum á okkara leiðum. Kanska ongantíð sum júst sangløtuna á midnátt á ólavsøku kenna føroyingar sín samleika sum mentað fólk og tjóð.

Eins og undanfarnu ár hava vit hampað og pyntað um býin, so hann í dag stendur veitsluklæddur. Skrúðgongan við ítróttarfólki hevur júst marsjerað til vakrar tónar frá Havnar Hornorkestri. Reiðfólkið fremst og ítróttarfólkið aftaná, øll í vøkrum búna, og hetta ber boð um, at ólavsøkan er byrjað.

Men einki kemur av sær sjálvum, heldur ikki skrúðgongan á ólavsøku.

Fyrsta skrúðgongan var í 1941, tá teir tríggir reiðmennirnir Kjartan Mohr, Vilhelm Társheim



Sosialurin